## Verjir Berbatov

Sir Alex Ferguson noktar at geva Dimitar Berbatov skuldina fyri tapið hjá Manchester United móti Everton í hálvfinaluni í FA-Cup. Everton vann dystin eftir brotsspark, og hjá flestu hyggjarunum verður mest sum arroganta kiksið hjá Berbatov standandi sum løtan, tá Manchester United tapti dystin. – Hatta er tað, sum kann henda. Eg veit væl, at fólk halda, at tá tú rindar £30 milliónir fyri ein spælara, so má hann skora upp á brotsspark, men við hvørt tapir tú slíkar brotssparkskappingar, segði Sir Alex Ferguson. Manchester United hevði annars vunnið tríggjar brotssparkskappingar á rað undan hesum. Millum annað Champions League finaluna móti Chelsea í fjør.



## Tips-monopolið avtikið

Eftir 60 ár við einkarrætti at bjóða út veddingarspæl um ítrótt, skal Danske Spil nú virka í fríari kapping við aðrar aktørar á marknaðinum. Hóast ES í nógv ár hevur kravt frían marknað á økinum, so hevur danska lóggávan vart Danske Spil. Men tað er nú liðugt. Einastu spølini, sum útlendskir útbjóðarar ikki sleppa at kappast við Danske Spil um, verða nú Lotto og skavispøl.

## Eitt lítið plástur á eitt stórt sár

**Kundi Sámal Joensen, so hevði hann skift heitið sum ársins spælari um við heiðurin sum føroyameistari**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tá atkvøðurnar vórðu taldar upp, var eingin ivi um, hvør átti heiðurin sum ársins spælari í føroyskum manshondbólti í 2009. Sámal Joensen var greiður vinnari framman fyri Áka Mørk og Jugoslav Djumic.

Kvøldið tóktist annars vera merkt av silvurið hjá Sámali Joensen. Umframt silvur í landskappingini, gjørdist annars væl vaksni vestmenningurin nummar tvey á máltindinum. Hann varð nummar tvey sum ársins verjuspælari og sum ársins álopsspælari var søgan tann sama.

Samanlagt var hann tó bestur av øllum, og tá vit eftir handanina fingu orðið á hann, segði hann, at tað fyrst og fremst lá nógv hart arbeiði aftanfyri.

- Vit hava vant øgiliga nógv í ár. Og í mun til hini árini, so var eg nógv skaddur í fjør. Í ár havi eg runnið aftaná hvørja venjing, og havi eg eisini vant meira, enn eg plagi at gera. So tað er nokk tað, sum hevur givið úrslit.

Nú gjørdust tú og VÍF ov stuttir í landskappingini, har tað gjørdist til silvur. Er hetta eitt stórt plástur at fáa á sárið.

- Nei. Eg vil heldur siga, at hetta er eitt lítið plástur á eitt stórt sár. Í tí liggur kanska eisini, at hetta næstan einki er vert, men sjálvandi er tað stuttligt kortini. Men eg hevði í øllum førum gjarna vekslað hetta um við eitt gullmerkið í landskappingini, segði



*Eftir handanina var sjálvandi tíð upp á at taka stóru felagsmyndina av teimum, sum høvdu verið á pallinum hendan dagin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Tey bestu av teimum bestu

**Leygarkvøldið varð rimmar gallaveitsla fyri hondbóltin hildin í Ítróttarhøllini á Hálsi, og sjálvandi vórðu bestu spælararnir í landinum heiðrað á degnum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hetta var 11. ferðin, at gallakvøldið varð hildið, og fyri fimtu ferð á rað var tað Hondbóltsdómarafelagið, sum skipaði fyri tiltakinum.

Tá dómararnir í sínari tíð tóku yvir, var hetta, tí teir ikki vildu hava, at kvøldið datt niðurfyri, tá einki felag tóktist so øgiliga áhugað í at skipa fyri veitsluni. Men leygarkvøldið søgdu dómararnir, at nú høvdu teir fyribils skipað fyri síni seinastu veitslu.

Tað verður tó ikki so, at gallaveitslan dettur niðurfyri. Tí í mest sum sama andadrátti staðfesti Eyðun Samuelsen vegna dómarafelagið, at gallaveitslan um eitt ár verður hildin í Vestmanna.

Tá tey bestu skuldu kjósast, var tað ikki óvæntað Adina Petrea úr Tjaldri, sum streyk avstað við tí mesta. Tað var longu greitt, at hon var besti málskjútti hjá kvinnum, men umframt steypið fyri tað, gjørdist hon eisini ársins álopsspælari og ársins spælari, umframt at hon eisini var partur av ársins liði.

Hjá monnunum var tað Sámal Joensen, sum gjørdist ársins spælari.



*Nógv verður gjørt burturúr gallakvøldinum. Ikki minst eru klæðini av slíkum slag, sum tað sømir seg til eitt kvøld av hesum slagnum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

